# Samkomublaðið fyri okt/nov 2016



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







## Kobla til Gud!

Tað kveikir náðigávurnar

Ingibjørn Royðutoft

www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Vit vunnu gullmedaljuna

*Sonja I. Jacobsen*

Tað var ein langur og harður dystur. Mótstøðan var hørð. Mótstøðuliðið brúkti síni skitnastu triks, koyrdu á okkum og óttaðust ikki fyri at trýsta okkum niður.

Skarin, ið heppaði mótsðuliðið, var stórur. Míni viðhaldsfólk hoyrdust ikki aftur í fjøldini. Tey vóru so fá, at tað var pínligt og nærmast eyðmýkjandi at halda við mínum liði.

Men vit kempaðu stillisliga. Valdu at hava breiðan rygg, hóast tað var hart - vit vildu spæla erliga og við heiðuri.

Endin á dystinum var nær, at mítt lið varð knúst niður. Har var onki eftir í okkum. Frøin á mótstøðuliðinum gjørdist størri og størri, sum dysturin leið. Har var gleði og rómur.

Tá tað leið heilt móti endanum, og bert fá sekund vóru eftir, og alt sá svartast út, hendi nakað. Mítt lið reisti seg upp. Sum ein bjørn úr vetrardvala. Ongin trúði sínum egnu eygum. Mítt lið bardi seg fram og endaði við einum stórsigri, sum ongin beint frammanundan hevði væntað at sæð. Vit vunnu gullmedaljuna!

Sannleikin er tann, at í veruleikanum spældi eg ikki við í hesum dysti. Eg var ov veik, hevði ikki tað, ið skuldi til, fyri at spæla ein slíkan dyst. Var ikki kvalifiserað.

Í veruleikanum var hetta heldur ikki nakar fótbóltsdystur. Nei, hatta var ein mynd upp á dystin um mítt lív, mína sál. Eg var ikki kvalifiserað til at spæla dystin. Bert ein var. Og hann bjóðaði seg til at taka dystin fyri meg.

Heimurin og menniskjan varð skapað fullkomið saman við Gudi, men tá ið syndin kom inn, stóð heimurin, menniskjan, eg, tú, fyri fríum falli. Falli í avgrundina. Men Jesus varð sendur til at taka stríðið og syndina á seg. Hann mátti pínast og doyggja fyri síðani at vinna sigur á syndini. Hann gjørdi tað av kærleika til okkara. Hann vann, og tí kunnu vit gerast vinnarar. Vegna hansara sigur, kunnu vit bera hesa sigursmedalju, vera á Hansara liði og eiga sigurlønina í Himli.

Esaias 53:3-5
Vanvirdur var Hann - fólk vendi sær frá Honum - maður, fullur av pínum og kunnigur við sjúku;
Hann var sum ein, ið fólk fjalir andlitið fyri, vanvirdur, vit roknaðu Hann fyri einki.
Men tað vóru sjúkur okkara, ið Hann bar, tað vóru pínur okkara, ið Hann legði á Seg - og vit hildu Hann vera heimsøktan, slignan og plágaðan av Gudi.
Men Hann varð særdur fyri brot okkara, soraður fyri misgerðir okkara; straffin varð løgd á Hann, so vit skuldu hava frið, og við sárum Hansara eru vit grødd.

Les eisini Jóhannes 3,16-17 og Kolossebrævið 2,13-15

# Skrá fyri okt/nov

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 24. okt. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 25. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 26. okt. | kl. 19.00: | Lærisveina- og leiðaraundirvísing |
| Leygardagur | 29. okt. | kl. 20.00: | AWAKE við Deboru Biskopstø |
| Sunnudagur | 30. okt. | kl. 11.00: | Morgunmøti við luttøku frá mansleguni. Breyðbróting |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 31. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 1. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 3. nov. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 5. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Peter Hedelund og Euroclass (DK) |
| Sunnudagur | 6. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Peter Hedelund (DK) Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 7. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 8. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 12. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við ymiskari luttøku |
| Sunnudagur | 13. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Tinu og Max (DK) Suppa fæst til keyps fyri 20 kr. |
| | | kl. 14.00: | Samkomufundur (sí meira undir Lýsingar) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 14. nov. | kl. 19.00: | Felags bønarmøti í Lívsins Orð, Runavík (frikjunetverkið) |
| Týsdagur | 15. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 16. nov. | kl. 19.00: | Lærisveina- og leiðaraundirvísing |
| Hósdagur | 17. nov. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 19. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Paula Høj |
| Sunnudagur | 20. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku |
| | | kl. 18.00: | Evangeliskt møti |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 21. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 22. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 26. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Tom Jacobsen |
| Sunnudagur | 27 nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj. Breyðbróting |

# Lýsingar

**Vitjanir komandi mánaðin**
Peter Hedelund, sum er á vitjan saman við Euroclass, fer at tala sunnudagin 4. november. Tey luttaka eisini til AWAKE 3. november.
Tina og Max, sum ofta hava verið í Kelduni í samband við hjúnarbandsundirvísing, koma at luttaka á møtinum sunnudagin 13. november.

**Samkomufundur 13. november**
Samkomufundur verður eftir møtið 13. november kl. 14.00. Suppa fæst til keyps fyri 20 kr. eftir møtið. Á samkomufundinum fara vit at tosa um páskastevnuna, kunna um útlendska vitjan , og um ymiskt annað í samband samkomuarbeiði, bygging og fráskúla. Hesin samkomufundur er fyri øll, sum hoyra til Kelduna. Tú, sum hevur Kelduna sum títt andaliga heim, ert vælkomin.

**At vaksa og leiða**
Ynskir tú at tæna Jesusi? Ynskir tú at gerast betri til at leiða onnur? Liggja menniskju tær á hjarta? Stig eru nú tikin at skipa lærisveina- og leiðaraundirvísing í Kelduni. Leisturin er, at stutt innlegg verða hildin, og síðan er samrøða um innihaldið í upplegginum.
Næstu undirvísingarnar verða mikukvøldið 26. oktober kl. 19.00 og mikukvøldið 16. november kl. 19.00.

**Hjúnabandslega**
Nú er aftur møguleiki at koma á hjúnabandslegu í Kelduni!
Vikuskiftið 11.-13. novembur vera Tina og Max í Føroyum og koma at hava leguna við okkum. Legan er fyri øll hjún. Møguleiki verður at sova á kømurum, skúlastovum ella búgva heima. Kostnaðurin fyri kømurini er 1200,- fyri hvørt parið, fyri skúlastovu 1000,-, har eitt par er í hvørji stovu og 800,-, tá fólk sova heima.
Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni www.keldan.fo.

**Christmas Child eskjur**
Á morgunmøtinum sunnudagin 30. oktober, verður møguleiki at lata skógvaeskjur inn í Kelduni til Christmas Child.
Á barnamøtinum sunnudagin fingu børnini kunning frá Lissi um, hvar eskjurnar fara í ár, hvat kann latast í eskjurnar, og so sóu tey eisini videolagið "Kærleiki í eskju".
Meiri kunning kann lesast á heimasíðuni hjá Christmas Child www.christmaschild.fo.

**Barna- og familjujólaveitslan**
Verður sunnudagin 11. desember. kl. 16.00.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584